## Føðingardagur við gallakvøldum

Nú Føroya Banki hevur rundað tey 100 árini, verður hetta markerða á ymsan hátt. Ein táttur, sum bankin nú hevur tikið upp, eru gallakvøld, sum verða hildin fyri kundum bankans. Gallakvøldini verða fimm í tali, og roknað verður við, at eini 4.000 kundar á hendan hátt fáa høvi at halda føðingardag saman við bankanum. Føroya Banki sendir í hesum døgum út innbjóðingar til ymsu kundabólkarnar, og framgongur av hesum, hvussu tekning fer fram.

## Skattalóggávu í lummastødd

Toll- og Skattstova Føroya hevur nú givið út lógasavnið fyri 2006. Í bókini, sum er í lummastødd, eru allar toll-, mvg-, skatta-, og avgjaldslógir, sum Toll- og Skattstovan umsitur. Til samans er talan um 37 lógir. Hartil er eisini givin út bóklingur við øllum kunngerðum og rundskrivum innan somu øki. Bøkurnar fáast til keyps í handlum kring landið, og kosta tær 100 kr. hvør.




# rustfríum stáli



*Á maskinverkstaðnum í Runavík starvast stívliga 40 mans. Høgt er til loft og vítt til veggja*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

ingin av, at viðskiftafólki fáa eina álítandi, skjóta og góða tænastu, og hetta er ikki minst galdandi, tá ið ræður um fiskiídnaðin – á sjógvi og landi.

Felagið, sum hevur landsins størstu goymslu av rustfríum stáli, telist millum fremstu virkir av sínum slagi í Føroyum.

Roynt verður altíð at veita viðskiftafólki tær vørur og tænastur, ið vinnan leitar eftir.

Eftir samanleggingina við P/F Tórshavnar Skipasmiðju, gjørdust teir fýra, sum tá áttu FJM, smápartaeigarar í Tórshavnar Skipasmiðju, og seinni hevur Frithleif Olsen so keypt hinar tríggjar út, soleiðis at hann í dag er hin einasti á FJM, sum eigur ein minni part í stóra felagnum.

Hinir tríggir eru saman við Frithleifi Olsen sum leiðara framvegis ein berandi partur av fyritøkuni, sum marknaðarførir seg undir heitinum, FJM í Runavík.

Í løtuni eru eini 45 fólk í starvi hjá felagnum.

### Sum áður

Frithleif Olsen, leiðari á FJM, sigur, at styrkin hjá maskinverkstaðnum er, at felagið hevur gott og dugnaligt fólk, og at hesi alla tíðina hava útvegað sær serkunnleika innan framleiðslu av útgerð til fiskiídnaðin.

- Vit hava soleiðis loyst óteljandi uppgávur fyri fiskavirkir, fiskiflotan og onnur, sum hava leitað sær til okkara um ráð og loysnir, bæði stórar og smáar. Við hollum royndum innan menning eru vit før fyri at veita loysnir – frá tekniborði til veruleika, sigur leiðarin.

Hann heldur annars, at samanleggingin við Tórshavnar Skipasmiðju, sum eisini eigur Skála Skipasmiðju, hevur riggað væl.

- Vit reka hetta virksemið sum frammanundan, og leiðslan á P/F Tórshavnar Skipasmiðju blandar seg til dagligt ikki upp í tað, sum vit gera. Samanleggingin merkir eisini, at onkrar funktiónir kunnu sparast burtur, og raksturin verður rationellari.

Frithleif Olsen sigur, at samanleggingin eisini ber í sær, at uppgávur nú kunnu deilast millum virkini og loysast, har størsti førleikin um ta ávísu uppgávuna er til steðar.

- Soleiðis er ikki neyðugt at hava somu funktiónir á øllum trimum støðunum, leggur hann aftrat.

# Saman eru vit førir fyri at loysa uppgávurnar

**– Standa vit saman um at loysa tær stóru uppgávurnar, soleiðis sum gjørt er í samband við umvælingarnar av rækjutrolaranum, Havborg, eru vit eisini kappingarførir mótvegis umheiminum, sigur Frithleif Olsen**

ÍDNAÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Maskinverkstaðurin FJM húsast í rúmligum hølum við Fjøruvegin - dygst við sjóvarmálan í Runavík*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Tey stóru arbeiðini, sum FJM hevur verið við til at útint í seinastuni, eru í fyrsta lagi umvælingarnar og nýgerðin umborð á rækjutrolaranum, Havborg, sum brendi í Noregi seint í summar.

Frithleif Olsen sigur, at samstarvið um hetta arbeiði, sum fleiri partar hava staðið saman um, hevur gingið fyrimyndarliga, og væntandi verður alt arbeiði liðugt sambært tíðarætlanini, 6. oktober.

– Standa vit saman um at loysa uppgávurnar, soleiðis sum gjørt er í hesum førinum, eru vit eisini kappingarførir mótvegis umheiminum, sigur hann.

### Arbeiðsdekk

Á FJM í Runavík eru teir eisini farnir undir at tekna og framleiða útbúnaðin til arbeiðsdekkið umborð á nýggju ísfiskatrolarunum hjá P/F Beta, ið Faroe Seafood nú eigur.

– Eins og vit teknaðu og bygdu upp arbeiðsdekkini umborð á Baki og Steki, sum vórðu bygdir á somu skipasmiðju í Vigo í Spaniu, hava vit eisini fingið til uppgávu at gera arbeiðsdekkini til hesar báðar bátarnar.

Frithleif sigur, at arbeiðsdekkið verður teknað, framleitt og sett upp á FJM. Síðan verður tað tikið niður aftur, pakkað og flutt niður til Spaniu, har tað verður sett upp umborð á nýggju trolarunum.

– Alt skal tilpassast væl, áðrenn farið verður úr Føroyum. Sjálvt mátini til føturnar, har pavnar og bond skulu festast, skulu vit geva teimum. Føturnir verða sveisaðir í skipsdekkið, áðrenn vit koma niður, og hetta styttir so aftur um tíðina til uppseting í Spaniu.

Hann sigur seg vænta, at menn hjá FJM fara niður til Spaniu við verksmiðjuni fyrst í komandi ári.

### Í Grønlandi

FJM hevur eisini havt nakrar mans í Grønlandi í nøkrum umførum, og um stutta tíð skulu menninir yviraftur.

– Hetta eru maskinarbeiðarar, sum hava verið við til at sett upp eitt knúsiverk í samband við málmframleiðslu til stálídnaðin. Tá ið menninir fara yviraftur, fara teir í holt við at seta upp eina fylliskipan, haðani tilfarið úr knúsiverkinum verður flutt umborð á skipini, sigur Frithleif Olsen.

Arbeiðið í Grønlandi er í Fiskifjørðinum, sum er á leiðini millum Nuuk og Maniitsoq.

### Linjuskipan

Umframt arbeiði umborð á Havborg, framleiðsludekkið til ísfiskatrolararnar í Spaniu og uppgávurnar í Grønlandi, er FJM eisini í holt við eina linjuskipan til rundan fisk á virkinum hjá Nevið Fiskaeksport í Saltangará.

– Hendan uppgávan fevnir um reinskeriborð, flutningsbond og pavnar, sigur Frithleif Olsen, leiðari á FJM.